# Lívfrøðiligt og mentanarligt fjølbroytni

**Heimskendi norski antropologurin, Thomas Hylland Eriksen, kemur til Føroya at halda almennur fyrilestur í framsýningarhølunum hjá Náttúrugripasavninum á Debesartrøð mikudagin, hin 4. august 2010, klokkan 19.30.**

**Framløgurnar hjá T.H. Eriksen og Janus Hansen 4. august eru partur av fyrilestrarrøðini um biodiversitet 2010.**

**Føroya Fróðskaparfelag, Lívfrøðingafelagið og Náttúrugripasavnið skipa fyri.**

***Janus Hansen, lívfrøðingur og ph.d lesandi, fer at tosa um verju av føroysku náttúruni.***





***"Nógvar hóttanir eru ímóti náttúruni í Føroyum: vegagerð, oljudálking, osfr. Tí er tørvur á áhaldandi verju av náttúruni. –Hvat gera vit fyri at verja okkara náttúru ímóti teimum?"***



***Thomas Hylland Eriksen er professari og granskingar-leiðari á CULCOM (Cultural complexity in the new Norway) á universitetinum í Oslo. Hann hevur útgivið nógvar bøkur innan so fjølbroytt evni sum nationalisma, etnisitetur, globalisering, minnilutar, evolutiónsástøði og multikulturalisma***

***"Hóast bæði lívfrøðiligt og mentanarligt fjølbroytni vanliga verða roknað sum jalig politisk mál í okkara tíð, so verða tey sjáldan sæð úr somu linsu. Fyrilesturin fer at vísa, at sami hugsanarhátturin, ið grundgevur mentanarligt fjølbroytni, eisini er fortreyt fyri lívfrøðiligum fjølbroytni. Nógv dømi, men eisini hugtøk sum nissju-skapan & fleksibilitetur, verða tikin fram fyri at visa á líkleikar"***